# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 13.11.2017 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Trúgvi Gudmundarson
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Niels Jacob Thomsen
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Føroyingafelagnum í Aalborg, Álaborg.**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla hesum.

2. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Tvøroyrar Fimleikafelag.**
   Tvey uppskot vóru um stuðulsupphædd – kr. 3.000 og kr. 5.000. Samtykt varð við fýra atkvøðum fyri at stuðla við kr. 3.000,-. Trúgvi Gudmundarson, Magni Bertholdsen, Gunnhild Mortensen og Eir J. Norðberg atkvøddu fyri.

3. **Umsókn um stuðul frá felagnum Víkingaskip.**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla verkætlanini.

4. **Avtala við Landsverk um vetrarhald 2017/2018.**
   Avtalan fevnir um kavarudding og salting av umleið 750 m av vegi í sóknini. Samtykt varð einmælt at taka undir við avtaluni.

5. **Tilboð viðvíkjandi dagstovninum "Brosið".**
   **Tilboð uppá at seta veggir upp um ventilatiónskassar – Brosið:**
   Tilboðið frá SH-Bygg Sp/f er á kr. 56.300 fyri tilfar og arbeiðsløn.
   Trivnaðarnevndin: Mælt verður til at taka av tilboðnum.
   Fíggjarnevndin: Samtykt einmælt at taka av tilboðnum.
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum og taka av tilboðnum frá SH-Bygg á kr. 56.300 v/MVG.

**Innkomin tilboð uppá skógvahillar til Brosið:**
Tilboð innkomin uppá skógvahillar til Brosið frá Tangavirkinum og Bærendsen Teknik. Trivnaðarnevnd og Fíggjarnevnd mæla til at taka av lægra tilboðnum frá Tangavirkinum. Einmælt Samtykt.

6. **Innkomin skriv frá Hvalbiar skúlastýri og Hvalbiar skúla.**
   **Skriv frá Hvalbiar skúlastýri viðv. Skúlagarðinum:**
   Trivnaðarnevndin: Mælt verður til at játta skúlastýrinum kr. 76.400 til ábøtur á skúlagarðin í 2018.
   Fíggjarnevndin: Einmælt samtykt at játta kr. 76.400 til skúlagarðin komandi ár.
   Einmælt samtykt.

   **Skelti til neyðútgongdir – Hvalbiar skúli:**
   Trivnaðarnevndin: Mælt verður til at játta keyp av skeltum og lási fyri íalt kr. 16.150.
   Fíggjarnevndin: Samtykt einmælt at játta pening til keyp av skeltum frá Gummibátatænastuni og lás til neyðhurð kr. 16.150 uttan MVG.
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum.

7. **Tilboð frá Tangavirkinum – rør.**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum frá Vega- og havnanevnd og Fíggjarnevnd um ikki at keypa rørini.

8. **Umbøn um eykajáttan til Suðuroyar Barnaverndartænastu.**
   Framrokningin fyri árið 2017 hjá Suð. Barnaverndartænastu vísir eitt hall kr. 155.000 – parturin hjá Hvalbiar Kommunu er kr. 23.397,99.
   Fíggjarnevndin: Einmælt samtykt at játta kommununar part - kr. 23.397,99.
   Einmælt samtykt.

9. **Tilboð frá Teldu Tænastuni.**
   Innkomin tilboð uppá teldur frá Teldu Tænastuni.
   Einmælt samtykt at keypa telduna kr. 9.359,- eftir tilmæli frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevnd.

10. **Roynhøllin – tilboð hondbóltsmál.**
    3 tilboð eru innkomin:

| | |
|---|---|
| Innspark: | kr. 26.237,50 v. frakt & levering |
| Blika: | kr. 37.678,00 v. frakt & levering |
| Motussport | kr. 45.000,00 v. frakt & levering |

Trivnaðarnevndin: Mælt verður til at taka av tilboðnum frá Innspark kr. 26.237,50.
Fíggjarnevndin: Samtykt einmælt at játta pening til keyp av hondbóltsmálum frá Innspark kr.

26.237,50 v. frakt og levering.
Einmælt samtykt.

**11. Hølisviðurskifti v.m. hjá Sernám í Suðuroynni.**
Fíggjarnevndin: Einmælt samtykt at beina málið aftur í nevnd.
Einmælt samtykt.

**12. Kostnaðarmeting tilfar til útbygning norðanfyri bygning matr. nr. 390e.**
Samtykt at taka málið av skrá.

**13. Umvæling av útveggi, norður- og vestursíða Hvalbiar skúli – innkomin tilboð.**
Eitt tilboð kom inn í sambandi við at drena norðan/vestanfyri Hvalbiar skúla – frá Sp/f E-Grevstur áljóðandi kr. 215.095 v/MVG.
Trivnaðarnevndin: Mælt verður til at taka av tilboðnum.
Fíggjarnevndin: Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá Sp/f E-Grevstur.
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum.

**14. Fyrsta viðgerð av fíggjarætlan 2018.**
Fíggjarætlanin fyri 2018 varð gjøgnumgingin aftaná viðgerð í Fíggjarnevndini. Samtykt varð við seks atkvøðum fyri, at skattaprosentið verður 19,95% og barnafrádrátturin framvegis kr. 6.500.

**15. Fyrsta viðgerð av eykajáttan 2017.**
Umsóknin um eykajáttan varð gjøgnumgingin, aftaná viðgerð í Fíggjarnevndini. Ongar viðmerkingar vóru til eykajáttanina.

**16. Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 22.30

Janus Thomsen Trúgvi Gudmundarson Magni Bertholdsen

Niels Olaf Eyvindsson Niels J. Thomsen Gunnhild Mortensen Eir J. Norðberg